# Øll komu væl frá óhappinum

**Bæði tær báðar kvinnurnar og nýføðingurin, sum vóru í einum ferðsluóhappi í Kollfjarðardali mikudagin, komu væl frá óhappinum, ið sá ógvusligari út, enn tað var**



**FERÐSLUÓHAPP**
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Tað var um hálvgum fimm tíðina mikudagin, at tveir bilar stoyttu saman í rundkoyringini í Kollfjarðardali.

Í øðrum bilinum var ein tilkomin kvinna, og í hinum ein yngri kvinna og nýføðingur hennara.

Mamma og barn vórðu beinanvegin flutt á Landssjúkrahúsið, sum sama kvøld upplýsti fyri politinum, at mamma og børn vóru sloppin uttan mein frá óhappinum.

Tað tóktist sum, at ein stór vanlukka var hend, tí tveir sjúkrabilar fóru í senn blunkandi úr Havn, og á staðnum vóru politistar í stórum tali.

Men tað var ikki so ógvusligt, tí tað var eitt samanfall av nógvum tilvildarligum, sigur politiið. Bara ein sjúkrabilur skuldi til hetta óhappið. Hin skuldi aðrastaðni. At so nógvir politistar vóru har, kom av, at politiið í Havn heví verið norðan fyri og gjørt ferðslukanningar, og á veg suður aftur rendu teir seg beint ó óhappið.

Portalurin hevði mikukvøldið eina mynd av einum bili, sum var farin út av vegnum í Kollfjarðardali.

Tað var aftur av tilvild, at eitt annað óhapp var hent nærindis hinum óhappinum. Bilarnir, sum tær báðar kvinnurnar koyrdu, fóru ikki út av vegnum, sigur politiið.

**09 Sep 09 16:54**

Fyri løtu síðani rendu tveir persónbilar saman í rundkoyringini við Kollafjørð.

Sum skilst á vakthavandi á politistøðini koyrdi ein tilkomin kvinna annan bilin, meðan ein ung kvinna við einum nýføðingi koyrdi í hinum bilinum, sum fór útav.

Sjúkrabilar og politiið komu á staðið og barnið varð koyrt á Landssjúkrahúsið.

Enn er støðan hjá barninum og orsøkin til óhappið ógreið, sigur løgreglan.

Pinkubarn í ferðsluóhappi helst ongan skaða

**09 Sep 09 21:23**

Nýføðingurin í bilinum, sum var partur av ferðsluóhappi við rundkoyringina við Kollafjørð seinnapartin í dag, hevur helst ikki fingið skaða.

Sum vit á Portalinum skrivaðu um í dag, hendi eitt ferðsluóhapp um fýratíðina seinnapartin við rundkoyringina í Kollfjarðadali.

Tá visti løgreglan ikki, hvussu statt var við pinkubarninum, sum varð sent á Landssjúkrahúsið.

Í kvøld verður sagt av politistøðini, at mamman og barnið eru kannað, og at tey eftir øllum at døma ikki hava fingið álvarsligan skaða.

Tað vóru tveir persónbilar, sum rendu saman við rundkoyringina. Ein tilkomin kvinna koyrdi í øðrum bilinum, meðan unga mamman koyrdi í hinum bilinum, har hon eisini hevði lítla nýføðingin við.

Sjúkrabilar og politiið komu á staðið og barnið varð koyrt á Landssjúkrahúsið, har tað framvegis er innlagt.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi, seinnapartin veksur hann vindin upp í hvassan vind. Támut veður og regn eitt skifti. Tó eisini sólglottar. Hitin millum 12 og 15 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Gul til stívt andøvsgul av vestri, seinnapartin minni vindur. Yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 14 og 17 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av vestri og útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 15 og 18 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men týsdagin hækkar hann upp í útnyrðing og ælingur. Hitin millum 11 og 15 stig.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 6 |
| Nuuk | 5 |
| Qaqortoq | 8 |
| Ammassalik | 6 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 0 |
| Seyðisfjørður | 9 |
| Tórshavn | 12 |
| Lerwick | 13 |
| Aberdeen | 17 |
| London | 19 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 14 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 17 |
| Keypmannah. | 17 |
| Helsinki | 15 |
| Moskva | 16 |
| Berlin | 15 |
| Warzawa | 16 |
| Kiev | 16 |
| Bukarest | 16 |
| Paris | 20 |
| Madrid | 30 |
| Róm | 29 |
| Malorca | 28 |
| Athen | 25 |
| Malta | 29 |
| Tunis | 31 |
| Beijing | 20 |
| New Dehli | 31 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 15 |
| New York | 21 |
| Miami | 27 |
| Los Angeles | 23 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | -- |
| La Paz | 16 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 20 |

## LUFTTRÝSTIÐ

Síðstu nátt:




Komandi nátt:




**Síðstu nátt:**
Eitt hátrýst, 1037 hPa. í útsynning úr Írlandi fer spakuliga í landnyrðing og mennist.

**Komandi nátt:**
Lágtrýstið í útsynning úr Hvarvinum fer móti Grønlandsfjørðinum og hitabrúgvin til havið eystan fyri Føroyar fer eystureftir.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 06/09 kl. 06[00] – 07/09 06[00]. Hitin í gjár: 11,9°
Minsti hiti máldur í september: -0,5° -
Mesti hiti máldur í september: 19,5°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 5,0 mm – mált frá 06/09 kl. 06[00] – 07/09 06[00].
Avfallið higartil í september: 16 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

| | |
|---|---|
| 31. august | Mánin longst frá jørðini |
| 4. september | Fullmáni |
| 12. september | Seinna kvarter |
| 16. september | Mánin næstur jørðini |

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 10. sept | 11:13 | 23:39 | 10:13 | 22:39 | 10:28 | 22:54 | 00:48 | 13:13 | 01:48 | 14:13 | 09:28 | 21:54 | 08:28 | 20:54 | 11:28 | 23:54 | 00:03 | 12:28 | 10:58 | 23:24 | - | 12:13 |
| 11. sept | - | 12:06 | 11:06 | 23:47 | 11:21 | - | 01:39 | 14:06 | 02:39 | 15:06 | 10:21 | 23:02 | 09:21 | 22:02 | - | 12:21 | 00:54 | 13:21 | 11:51 | - | 00:39 | 13:06 |
| 12. sept | 00:47 | 13:29 | - | 12:29 | 00:02 | 12:44 | 02:47 | 15:29 | 03:47 | 16:29 | 11:44 | - | 10:44 | 23:26 | 01:02 | 13:44 | 02:02 | 14:44 | 00:32 | 13:14 | 01:47 | 14:29 |
| 13. sept | 02:11 | 14:53 | 01:11 | 13:53 | 01:26 | 14:08 | 04:11 | 16:53 | 05:11 | 17:53 | 00:26 | 13:08 | - | 12:08 | 02:26 | 15:08 | 03:26 | 16:08 | 01:56 | 14:38 | 03:11 | 15:53 |
| 14. sept | 03:20 | 15:48 | 02:20 | 14:48 | 02:35 | 15:03 | 05:20 | 17:48 | 06:20 | 18:48 | 01:35 | 14:03 | 00:35 | 13:03 | 03:35 | 16:03 | 04:35 | 17:03 | 03:05 | 15:33 | 04:20 | 16:48 |


Forelskað?
Vís tað í Sosialinum

– Virkin og virðismikil
www.javni.fo